# Stór ráðstevna um fígging av olju-vinnu í Atlantshavi

*Hvussu gongst við samráðingunum millum føroyingar og bretar um ásetan av einum undirgrundarmarki og kann enn óloysta marknatrætan ávirka íløguhugin hjá fíggingar- og bankaverðini í sambandi við eina komandi oljuvinnu á leiðunum millum Føroyar og Hetland?*

*Hetta eru nakrir av spurningunum, sum verða viðgjørdir á eini stórari ráðstevnu í bankaverðini í London um eina viku. Tá fara umboð fyri oljuvinnuna og stóru og mætu bankaverðina at siga sína hugsan um komandi oljuútviklingin vestan fyri Hetland og fíggingina av hesi vinnu*

Áhugin fyri nýggja útjaðar oljuøkinum í Norðuratlantshavi ella rættari økinum millum Hetland og Føroyar er nú so mikið stórur, at tann týðandi og máttmikla fíggingarverðin nú av álvara er farin at geva tí ans. Talan er um heilt nýggjar avbjóðingar fyri teir stovnar og feløg, sum skulu til at fíggja oljuvinnuna.

Týsdagin 30. mars verður ein ráðstevna hildin í sjálvum hjartanaum á banka- og fíggingarverðini í Bretlandi, City í London.

Evnið er leikluturin hjá bankum og fíggingarstovnum í útviklinginum av eini oljuvinnu vestan fyri Hetland. Ráðstevnan er tann næsta stóra stevna av sínum slag um nýggju oljuleiðirnar vestan fyri Hetland. Í oktober í fjør varð skipað fyri fyrstu veruligu ráðstevnuni um møguleikarnar at finna oljukeldur í hesum nýggja økinum. Hon var í Aberdeen, og tá vóru eisini fleiri føroyingar við.

Nú er so túrurin komin til at tosa um, hvussu nýggja oljuøkið skal fíggjast og annars viðgera aðrar peningaspurningar, sum hava tilknýti til nýggja økið.

Ráðstevnan verður hildin á "City University" í London. Umframt universitetið standa "The Institute of Petroleum" og "Smith Rea Energy Analysts Limited" sum innbjóðarar.

## Stórar avbjóðingar

Stórar avbjóðingar standa fyri framman hjá teimum, sum skulu fíggja framtíðar oljuframleiðsluna, nú so stórar broytingar henda á økinum. Tað er spurningurin um at fara yvir til at brúka heilt nýggja tøknifrøði í leitingini eftir olju og gassi, eitt nú horisontala boring, tað snýr seg eisini um broytingina í sjálvum framleiðsluháttinum, har farið verður burtur frá at brúka risastórar og sera kostnaðarkrevjandi framleiðslupallar til at brúka flótandi framleiðsluskipanir.

Síðani er tað eisini avbjóðingin, sum liggur í at fara undir oljuvinnu í einum heilt nýggjum øki, har tað í løtuni ikki finst nakar infrastrukturur.

Fyrilestrarnir eru nógvir. Norman Smith frá ráðgevandi fyritøkuni Smith Rea, sum hevur gjørt fleiri frágreiðingar um møguleikarnar at finna olju í økinum, fer at viðgera spurningin um, hvussu nógv olja kann hugsast at verða goymd í undirgrundini vestan fyri Hetland og Orknoyggjar. Hann fer eisini at viðgera leitingina, sum hevur verið í økinum higartil og gera sínar metingar av framtíðar gongdini bæði hvat viðvíkur tíðarætlanini og hvat slag av útviklingini talan verður um.

Rolf Borresen frá "Golar-Nor Offshore" fer at tosa um nýggja framleiðsluháttin við flótandi framleiðsluskipanum. Her fer hann serstakliga at umrøða arbeiðið at fara undir framleiðslu frá Foinaven oljukelduni. Her er talan um at royna heilt nýggjar loysnir í einum nýggjum øki við øðrvísi umhvørvi enn t.d. í Norðsjónum og við ongum infrastukturi í heila tikið.

Jim Parker frá "Parker Environmental" fer at tosa um serstøku umstøðurnar í nýggja umhvørvinum við serligum atliti til trygdina og hann fer at meta um, í hvønn mun oljuvinnan er før fyri at ganga nýggju og broyttu krøvunum frá umhvørvinum á møti.

## Marknatrætan á skránni

Síðani verður ein fyrilestur, sum ikki minst hevur áhuga fyri føroyingar. Hann ber heitið "The negotiations are to agree the boundary: a "median line" is only one possible outcome" tvs. at samráðingarnar snúgva seg um at semjast um markið. Ein miðlinja er bert ein møgulig loysn.

Í fyrilestrinum, sum eitt umboð fyri antin uttanríkismálaráðið ella handils- og ídnaðarmálaráðið fer at halda, verður greitt frá samráðingunum millum Føroyar/Danmark og Bretland um at finna eitt mark millum báðar landgrunnarnar. Har verður greitt frá teimum altjóða løgunum og praksis viðvíkjandi ásetan av landsgrunnsmarki, eitt nú ST konventiónin um havrætt. Somuleiðis verður greitt frá, hvørji framstig hava verið í samráðingunum og um teir trupulleikar, um teir í heila tikið finnast, sum støðan hevur á íløguhugin.

"A new Financing era?" er heitið á fyrilestri, sum Leonard Rea, stjóri í Smith Rea-ráðgevarafyritøkuni fer at halda. Her fer hann at leggja upp til orðaskifti um, hvørja ávirkan nýggju avbjóðingarnar vestan fyri Hetland fara at hava fíggingarmøguleikarnar.

Sostalurin frættir frá fyrireikarunum av ráðstevnuni, at sera stórur áhugi er fyri henni.

Føroyingar eru eisini vælkomnir at vera við. Óvist er um umboð fara úr Føroyum. Men tað er ikki óhugsandi, at Árni Olafson, leiðari fyri føroysku samráðingarnevndin og onkur umboð fyri føroysku fíggingarverðina vera við.

jan



*Her lýða teir mongu áhoyrarnir á ráðstevnuni í Aberdeen í fjør á fyrilesturin hjá Árna Olafson um marknatrætuna. Mynd jan*

FINANCING THE FRONTIER

The City's Role in the West of Shetland Oil Development

Thursday 30th March 1995

To be held at

City University London EC1

IP THE INSTITUTE OF PETROLEUM

SREA

CITY University

**Hús í Íslandi**

Eg eigi eini eldri hús í Grindavík, sum eg fegin vil býta um við hús í Tórshavn ella Kollafirði.

Í Grindavík er nógv arbeiði.

**Tlf. 009-354-2-68471 – Jón**